


www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 06 - 2012

# Statoil og ExxonMobil bingo í altjóða oljuleiting

Tey bæði oljufeløgini, sum í komandi viku fara undir at bora djúpasta brunnin í Føroyum nakrantíð, Statoil og ExxonMobil hava júst gjørt enn eitt stórt gassfund út fyri strondina í Tanzania í Eysturafrika. Hetta hendir stutt eftir, at feløgini gjørdu eitt stórt fund á somu leiðini. Tey bæði fundini tilsamans verða mett at vera størri enn risa gasskeldan, Snøvit út fyri Norðurnoreg, har nógvir føroyingar hava arbeitt. Her er talan um tvey fund, sum goymir tað, ið svarar til meira enn 1,5 milliardir tunnur av olju. Nýggja fundið í Afrika er sjeynda high impact oljukeldan, sum Statoil finnur innan fyri 14 mánaðir. Tim Dodson, sum er stendur á odda fyri altjóða leiting, sigur, at Statoil fer at taka avgerð um útbygging av báðum fundunum í næstu framtíð. Dodson, sum hevur havt eydnuna við sær í øllum teimum seinastu fundunum hjá Statoil kring heimin, varð herfyri kosin at vera heimsins besti leitistjóri. Nú fáa vit at síggja um eydnan eisini er við Dodson og starvsfelaga hansara Rúna M. Hansen, tá Statoil saman við ExxonMobil fer at bora í Føroyum í næstum. Tey mongu stóru fundini hetta seinasta árið eru partur av altjóða strategiini hjá Statoil at bora í støðum, har felagið metir møguleika vera at gera heilt stór fund, men har váðin eisini er rættiliga stórur. Føroyar eru eisini partur av hesi strategiini og um 4 til 5 mánaðir vita vit, um framúr góðu úrslitini hjá Statoil eisini fevna um Føroyaøkið. Onnur stór fund, sum koma undir hesa væleydnaðu strategiina hjá Statoil eru Skrugard og Havis í Barentshavinum, Johan Sverdrup (fyrr Aldous/Avaldsnes) í Norðsjónum og Peregrino í Brasil.